# TAÐ HENDIR ...

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



## PÍLAGRÍMSGONGA

Sunnudagin verður pílagrímsgonga í Suðuroy. Í ár verður gingið úr Fámjin um Øravík til Túgvuna á Halgafelli og so aftur til Øravíkar. Bussur koyrir frá Bønhúsinum í Øravík kl. 9.30. Byrjað verður við stuttari gudstænastu í Fámjins kirkju kl. 10. Aftaná verður farið til gongu eftir varðagøtuni um Øraskarð til Tingstovuna, har vit eta matpakka, sum vit hava við okkum. Steðgað verður á ávísum støðum á leiðini. Síðan verður gingið oman til Øravíkar, har stutt gudstænasta við altargongd verður í Bønhúsinum. Eftir gudstænastuna verður gingið út á Túgvuna á Halgafelli, sum er gamla navnið á Hovstúgvuni. Har verður endað við einum bønahaldi. Gingið/farið verður so aftur til Øravíkar. Tá verður høvi til at koma í Gistingarhúsið at eta eina døgurðamáltíð saman.

**PÍLAGRÍMSGONGA**
Suðuroy
Sunnudagin 15/5 kl. 9.30



## FØROYA STERKASTI SKAL FINNAST

Sunnudagin verður aftur kappast um at gerast Føroya sterkasti maður. Kappingin verður í ítróttarhøllini á Hálsi, og kappast verður í 6 ymiskum greinum. Í steðginum spælir Jens Marni Hansen nakrar sangir.

**FØROYA STERKASTI MAÐUR**
Høllin á Hálsi
Sunnudagin 15/5 kl. 17.00




## KAMPUR UM HAVNINA – OG FØROYAR

Sunnudagin og mánadagin verður 8. umfar í Vodafonedeildini spælt. Ein av dystunum hesaferð er ársins fyrsta slag um høvuðsstaðin. B36 og HB skulu stríðast um valdið í Havnini, og bæði feløgini bjóða eisini av í stríðnum um føroyameistaraheitið. So lagt er upp til eitt brak í Gundadali sunnudagin.

**B36-HB**
Vodafonedeildin
Sunnudagin 15/5 kl. 15.00



## DR. HOOK

Bólkurin, sum upprunaliga kemur úr New Jersey í USA, hevur verið meira og minni virkin síðani 1969. Eyðkendi sangarin í bólkinum er Ray Sawyer, og kendir sangir hjá Dr. Hook eru Sylvia's Mother, The Cover of the Rolling Stone og Storms Never Last. Allir hesir sangir verða at hoyra, tá ið Dr. Hook spælir í høllini á Hálsi leygarkvøldið.

**DR. HOOK**
Høllin á Hálsi
14/5 kl. 22.00




## FRÍGGJADAGUR 13.

Í nógvum mentanum verður fríggjadagur 13. settur í samband við óhepni. Upprunaliga stavar hugtakið frá 1307, tá ið tempulharrar vórðu fangaðir, píndir ig brendir á báli eftir boðum frá Philip kongi IV av Fraklandi. Síðani hevur dagurin verið mettur sum óeyndudagur. Fríggjadagur 13. Er eisini er ein røð av ræðufilmum, har Jason Voorhees drepur frá hond. Kanska upplagt at seta ein av teimum filmunum frá í kvøld.

**FRÍGGJADAGUR 13.**



## DJÓRADAGAR Í HOVI

Aftur í ár verða djóradagar í Hovi við føroyskum djórum. Dagarnir vera hetta vikuskiftið. Djóradagnir eru eitt familjutiltak. Børnini kunnu royna ymiskt og síggja nógv ymisk djór. Tey kunnu ríða á føroyskum rossum (ponyríðing), hoppa í hoppiborg, skreiða í skreiðiborg, røra við nøkur av djórunum. Scorpion, sum er skjóttgangandi bátur, verður við aftur við í ár, so til ber bæði hjá vaksnum og børnum at fara ein túr eftir Hovsfirði. Pengarnir sum koma inn til tiltakið fara til Suðuroyar Hestafelag, sum hevur ætlanir um at byggja stórt fjós í Suðuroynni.

**DJÓRADAGAR Í HOVI**
Leygardagin 14/5 og sunnudagin 15/5